# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Hví ikki EITT føroyskt oljufelag!

Hóast mong kanska ikki geva tí serligan ans, so kunnu sjálvt smá fet í royndunum at finna olju við Føroyar, telja nógv. Eitt slíkt fet eru tíðindini um, at StatoilHydro nú er farið at skjóta seismikk á landgrunninum. Og enn hugaligari – felagið hevur tikið avgerð um at bora í minsta lagi enn ein brunn. Vit kunnu bert fegnast og vóna, at StatoilHydro fer at gera sítt til at halda lív í oljuleitingini. Í løtuni er tað lokomotivið, ein leiklut felagið hevur fingið eftir, at BP fór undir at pakka saman her. Vit mugu tó ikki gloyma hini feløgini, sum eisini eru hugað at brúka íløgupengar við Føroyar. Her ikki minst italska ENI, sum í løtuni kann standa til at gerast felagið, sum finnur fyrstu oljuna við Føroyar.

Tað er eisini hugaligt at frætta, at føroysku oljufeløgini eru við í kanningunum, sum StatoilHydro stendur fyri og harvið eisini kunnu vera við í boringini um nøkur ár. DONG er eisini við, so vit tosa um eitt reint norðurlendskt konsortium. Tað hevði verið hugaligt, um hetta fann rakstrarverdugar nøgdir av olju.

Nógvir føroyingar hava sett pengar í tey bæði føroysku oljufeløgini, og tað hevði verið gott, um bæði tvey vóru við, tá olja vónandi verður funnin. Henda møguleika hava vit so, tá StatoilHydro fer at bora. Men um ENI ger eitt fund næsta ár, tá er so tað eina av hesum feløgum við.

Men hví ikki standa saman heldur enn spjødd, tá tað um hetta okkara felags áhugamál ræður: at finna olju við Føroyar og vera við í oljuleiting og framleiðslu í okkara grannalondum! Hóast Atlantic Petroleum við dugnasemi hevur megnað at menna seg til at gerast framleiðandi felag, so vita vit eisini, at felagið er í tungum sjógvi. Nakað, sum ikki er óvanligt fyri smærri oljufeløg, serstakliga tá oljuprísurin fellur og ikki er tann man hevði roknað við. Eykaaðalfundur er í felagnum fríggjadagin, har tríggir nýggir nevndarlimir skulu veljast. Vit kunnu so bara gita, hvat hetta fer at merkja. Helst fara vit at síggja fleiri broytingar. Spurningurin er so hvørjar. Í eini tíð har tað er heilt vanligt, at oljufeløg leggja saman fyri at standa sterkari, kundi verið náttúrligt at spurt, um tað ikki hevði gagnað teimum túsundtals føroysku partaeigarunum í AP og teimum hundraðtals í FP, um feløgini stóðu ella løgdu saman!

Vit skulu ikki gera okkum klók uppá alt hetta men vilja kortini loyva okkum at spyrja, um hetta ikki kundi verið ein logisk fylgja út frá teirri støðu, sum AP er í! Kann ein samanlegging fara at merkja, at teir føroyingar, sum hava sett og ætla at seta pengar í oljuvinnuna, kunnu kenna seg tryggari við sína íløgu! Og kann ein slík samanlegging ikki eisini gera tað lættari at fáa veruligt samstarv við útlendsk oljufeløg, sum fara at ganga undan í leitingini her hjá okkum í framtíðini! Kundi hetta ikki verið ein ideel konstellatión – við EINUM føroyskum oljufelag, sum stóð sterkari á heimamarknaðinum og sum rakk longur út á altjóða marknaðin! Hetta er so ein møguleiki - ella er tað? Vit fara í hvussu er at ynskja feløgunum góðan byrð í framtíðini – hvør sær ella saman.

**Sosialurin**

## Gev mær vit eftir orði Tínum. Sálmur 119,169 b.

RICHARD DANIELSEN



Sálmur 119 er longsti sálmur, vit hava í bíbliu okkara, hann er eisini longri enn allir aðrir kapitlar. Tað, sum eisini eyðkennir henda sálm, er at hann, so at siga í hvørjum versi, vísir til orðið, sum hetta versið omanfyri.

Orð Guds bíblian er einasta bók, ið gevur okkum ein boðskap um, hvat lívið er, einasta bók sum sigur frá um deyðan og um ævinleikan, einasta bók sum veitir troyst viðvíkjandi øllum vandamálum, vit menniskju stríðast við, einasta bók sum gevur vón, einasta bók sum gevur fulla vissu, einasta bók sum sigur okkum frá, hvat ið synd er, og sum gevur okkum fulla vissu um syndafyrigeving og fullan frið í hjartað við trúnni á Kristus. Einasta bók sum sigur okkum frá um GUD, skapara okkara opinberaður í holdi við Jesusi Kristi, soleiðis at vit kunnu skilja hjartalag hansara, hann sum annars ikki er til at fata, hesin ævigi Gud, sum altíð hevur verið er og verður, ein altíð verandi "EG ERI."

Bíblian sigur okkum frá, hví vit eru her. Áp. 17,26-31. Hvussu vit kunnu verða frelst. Áp 16,31-33. Og, sum longu víst á, fáa fulla vissu um tað, sum kemur aftaná deyðan, vandamálið sum øll menniskju stríðast við innast inni.

Bíblian er mest elskaða bók í heiminum og kanska mest hataða eisini. Hví eru so mong, sum hata hana og stríðast fyri at gera hana til einkis, velja alt annað at byggja á til frelsu osf.. Tí Djevulin er heimsins harri, og hann stendur aftanfyri alt tað ónda í hesum heimi. Men Harri okkara fer at gera enda á honum og øllum, sum fylgja honum. Men enn er náðihurðin opin. Lurtað tí eftir boðskapi bíbliunar, bygg ikki frelsu og ævigu lagnu tína á onkran átrúna ella okkurt annað, men trúgv á boðskap bíbliunar, og hann er um frelsaran Jesus Kristus.

Og frelsa er ikki í nøkrum øðrum; heldur ikki er nakað annað navn undir himli, givið millum menniskju, sum vit skulu verða frelst við." Áp.4,12.

Men so mongum sum tóku ímóti Honum, gav Hann mátt at verða børn Guds - teimum, ið trúgva á navn Hansara; Jóh. ev. 1,12.

## -víkar ella -víks?

ARNE THORSTEINSSON

Í seinastuni hevur ein undarligur tvídráttur tikið seg upp í bløðunum. Stríðið stendur serstakliga um bendingina av kvenkynsorðinum vík í samansetingum.

Annar parturin førir fram, at vík eitur víkar í hvørsfalli eintal, og soleiðis eigur orðið altíð at verða bent. Tí er skeivt at siga ella skriva t.d. Hoyvíkshólmur ella Tjaldavíkshólmur. Hesi staðarnøvn eita av røttum Hoyvíkarhólmur og Tjaldavíkarhólmur, og soleiðis eiga tey at verða skrivað og framborin.

Nei, sigur hin parturin. Í ávísum førum fær kvenkynsorðið vík endingina –s í hvørsfalli eintal, og tí er rætt at siga og skriva t.d. Hoyvíkshólmur.

Báðir partar fara skeivir.

Sjálvandi hevur vík bert endingina –ar í hvørsfalli eintal. Vit fara til Víkar, Tjørnuvíkar, Húsavíkar o.s.fr., men hóast tað kunnu vit av røttum bæði siga og skriva Hoyvíkshólmur og Tjaldavíkshólmur, sum fólk flest eisini gera.

Innan navnagransking er tað eitt vælkent fyribrigdi, at er fyrri liður í einum samansettum navni í sjálvum sær eitt samansett navn, gerst orðið ov tungt at frambera, og fyrri liðurin missir tí bendingarendingina. Um neyðugt er, setir brúkarin í staðin inn, tað navnagranskarar kalla eina kompositiónsfugu, sum vanligvís er eitt -s-.

Vit siga Víkarbyrgi, tí fyrri liðurin í sjálvum sær er eitt einstakt orð, men vit siga Tjaldavíkshólmur, tí fyrri liðurin – Tjaldavík – í sjálvum sær er settur saman av tveimum orðum. Bendingarendingin –ar verður tí burtur í Tjaldavík, og fyri at binda hetta langa navnið saman seta vit inn kompositiónsfuguna –s- millum orðini Tjaldavík og hólmur – Tjaldavíkshólmur. Hetta hava føroyingar gjørt í mangar øldir. T.d. verður í brøvunum um arvastríð um ein garð í Húsavík frá fyrst í 1400árunum skrivað Húsavíksgóðs.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.